lesarabrøv

Viðmerking til John Rødgård og FSF

John Rødgård hevur í grein, prentað í fleiri bløðum, skrivað um sína ónøgd við FSF og funnist at teirra avgerðum viðvíkjandi TB. Einki skal her verða sagt um tað, tí maðurin veit helst um viðurskiftini hjá TB.

Men tað er ikki sørt frekt av hesum manni at kæra leikara hjá B71 at hava sligið dómara í dysti á Sandi. Sjálvur var John Rødgård ikki til staðar á Sandi, og eingin leikari hjá B71 hevur sligið dómara ella linjuverja. Tað er próvfast.

Rætt er tað, at FSF hevur dømt B71-leikara leikbann í tríggjar leikdagar og B71 bót áljóðadni kr. 2.000,-. Men hví hesin dómur er sagdur, veit hvørki B71 ella leikarin, talan er um.

B71 hevur biðið FSF greitt frá, hvat teir eru ákærdir fyri, men teir hirdu teimum ikki svar.

B71 kærdi avgerðina hjá FSF til dómsnevndina — framvegis uttan at kenna ákæruna — og bað dómsnevndina siga orsøkina til dómin. Heldur ikki dómsnevndin hirdi at svara hesum spurningi. Hon staðfesti dómin hjá FSF.

Sostatt eru B71 og B71-leikari dømd, uttan at vita hví?

Man John Rødgård kortini hava betri viðurskifti við FSF, enn hann letst, so at hann kennir ákæruna móti B71?

Til FSF og avvarðandi dómaratrio: Hvi avsanna tit ikki slíkar skuldsetingar? Tað er sera álvarsligt at leggja mann undir at hava sligið!

J. Joensen

Revolvarajournalistikkur

Til blaðstjóran á Sosialinum, itróttarskrivaran ella tann, ið ábyrgdina hevur av hesi uppseting í blaðnum 18. sept. 1990.

Hvat er tað, tú vil siga lesarunum, tá ið tú setur mynd av Páll á Reynatúgvu inn í grein, sum John Rødgård úr TB hevur skrivað.

Greinin hjá John Rødgård er stílað til FSF og er um ónøgd hansara við teirra arbeiði, dómarastandin, landsliðið o.a. Tó nýtir John Rødgård 3 reglur — av teimum 309 greinin er long — at skriva at B71-leikari hevur sligið dómara.

Ein skuldseting, sum B71 ongantið hevur fingið frá FSF, og vitnisfast er, at hon er følsk.

Hvi skal myndin av B71-leikara nýtast her? Sig ikki, at hon er tilvildarliga vald!

Metir Sosialurin, at hesar triggjar reglurnar eru tær avgerandi í brævinum hjá John Rødgård?

Sjálvur man hann ikki hava sent myndina við, tí hon var ikki at siggja í hinum bløðunum.

Var ikki journalistiskt rættari at havt mynd av greinskrivaranum, TB, FSF, dómarum ella landsliðnum — tí, sum greinin er um?

Revolvarajournalistikkur, ið rakar tey vápnaleysu!

J. Joensen



Nr. 147 — 18. september 1990 tíðindablaðið sosialurin

lesarabrøv

Åbent brev til FSF

Det er nu mere end to måneder siden undertegnede i et åbent brev stillede FSF/ISF nogle spørgsmål vedrørende gokskabningen til TB. Det er ikke kommet noget svar. Det havde jeg faktisk heller ikke regnet med. Det var først og fremmest et forsøg på at få begrundet til at skåne lidt. Jeg føler mig desværre nu nødsaget til at bryde det op.

Først må jeg kommentere det angivelig Ole Thorsteinsen i Dagbladet Dimmalætting (DD) Holm med udgangspunkt i min artikel. Det har naturligvis sidrag i særet men, herunget at blande mig i hvordan Ole Holm kører sit job på holdet i Vág. Det har jeg hverken lyst til eller forudsætninger for.

Dernæst om «fodbemærkning til femøre 02» TB. Ved en henvendelse til beklagedirektøren har det vist sig at FSF vel ikke prøvede at skaffe en beklagelse til TB. Så vidt jeg kan se har FSF dårlige læst for os. Det sørgede ved det er ensfodbold, at det ikke engang overrasker en.

Og så over til de andre skandaler 1990 er et rigt år. Vi så grotesk-sagen MB-GI, hvor man ikke kunne finde rundt i sine egne regler. Skal vi regne med at der bliver gjort noget ved disse regler inden den næste protest kommer? Der var den interessante kamp B71-TB, der blev ledet af en dommer, som ikke har lov at dømme i 1. division. Hjemmeholdet vandt 1-0 på et tvivlsomt straffespark.

Vi så en B71-spiller få tre spilledages karantæne for at stå en dommer og husker TB'eren, som for to år siden fik et halvt års karantæne for at true en dommer.

Og så var der jo den store skandale, der ikke blev snakket så meget om: TB-HB og tid dels HB, SEF). Her blev mik sat verdensrekord i amatørfodbold nogensinde.

1. HB-SEF ledte af en bemærkelsesværdig dommertrio. Dommeren er bror til HB's træner, den ene linievogter er bror til HBs formand og i øvrigt selv aktiv i HB både som spiller og i forretningsarbejde. Det er dejligt simpelt. At en sådan trio er inhabil kan slet ikke diskuteres. Her er allerede begået en alvorlig fejl. At HBs andet — i praksis afgørende — mål i følge avisernes fagtede tilsyn af afsluttede, gør ikke sagen bedre.

2. Tirsdagen inden TB-HB kampen heder TB'ren en anden dommertrio ved henvisning til inhabilitet. Så ved jeg har forvået det overfader FSF beslutning en til dommerforeningen, som — ja man undres — overtrader det til dommerkomitéen selv at afgøre, om man er inhabil? Prøv engang at forestille Jer samme fremgangsmåde ved en retssag! Man kan så spekulere på, hvorfor en dommer overhovet ved dommer en kamp, hvor han er uønsket. Specielt når man mener at kunne huske, at det var den samme dommer, som i Olaskampen HB-TB 1988, fløjtede 1. halvleg af 55 sekunder for tidligt — netop som TB var ved at score til 2-0! Jeg sad på bænken og kunne se vores trænere stoppe.

3. Da der var spillet omkring et kvarter af TB-HB kampen, var dommeren ude at give HBs træner en henstilling. Faktisk uden grund. Billigt skuespil. Først er jeg, og var sikker på, at vi ville tabe. Senere mente vi os så snydt for i hvert fald to straffespark. Den slags kan altid diskuteres, men vil normalt være afgørende i en TB-HB kamp. Det var vel ikke det, HBs træner i et øvrigt udmærket — uden kampen mente med de små afgørende marginal er?

I øvrigt var der efter kampen adskillige pålidelige vidner, som så dommeren sidde i baggen til færgen og synge med på HBs sejrssange!

4. Skulden alle mine skriverier at jeg er en dårlig taber? Den sædvanlige undskyldning med dommeren? Nej, resultaterne betyder ikke så meget mere, i brøgvedende gammelmandsalder. På sidende fod kan jeg da nævne, at vi havde fortrinlige dommere, da vi tabte til Leka, B68, VB og KI i sæ — modsat — havde dommeren imod os, da vi vandt over MB.

Men når min retfærdighedssans bliver krænket, bliver jeg sur. Det der er det eneste triste i dette her er ikke at TB tabte til HB. Det havde vi måske gjort alligevel. Men man har givet os god grund til at føle, at vi er blevet snydt. Sidstnævnte det er gjort bevidst eller på grund af ligegyldighed. DET HAVE VI KRET SAT AT UNDGÅ. Hvis for ville man ikke dreje det er praxist det, man må være ude i vækster for fremover. Ikke bar man ikke gjort linie denne dommertrio dømme mere TB. Lader bvad mig

Viðm.:
Nevnda lesarabræv viðgjørdi ymiskar spurningar viðvíkjandi fótbólti, og tí helt eg tað vera hóskandi at prýða brævið við eini fótbóltsmynd.

At myndin er av Páll á Reynatúgvu var eg ikki greiðir yvir, tí eg kenni ikki mannin.

Tað var tí avgjørt ikki okkara ætlan at raka nakran sum helst, bert ásanna, at myndavalið í hesum føri var óheppið.

blaðstj.

BINGO

Bingo verður sunnudagin kl. 16.00 í bygdarhúsinum.

Gjáar Samkomuhús

Føroya Landsbókasavn



Broyttar upplatingartíðir

Frá 1. oktober 1990 hevur Føroya Landsbókasavn opið soleiðis:

Mánadag-fríggjadag	kl. 10—18
Leygardag	kl. 09—12

Føroya Landsbókasavn

J.C. Svabos gøtu 16
P.O. Box 61
110 Tórshavn

Tlf. 11626
Telefax 18895

Á frælslynta støði vj!

Tað er neyðugt at føroyska samfelagið fær eina nýggja dynamiska politiska leiðslu, sum kann sameina allar partar, í eini roynd at endurreisa sorlaða búskaparliga støðið, á einum frælslyntum miðflokka støði, har ávirkanin frá høgra og vinstra verður avmarkað sum frægast, skrivar Lasse Klein í aftursvari sínum til oddagrein, sum vj hevur skrivað.

politisk viðmerking

VJ spyr í oddagrein í Sosialinum, hví vit ikki hava lært av royndunum, sum gjørdar eru.

Ósmæðin tykist vj at vera, spyr allar aðrar uttan seg sjálvan og javnaðarflokkin!

Sjálvstýrisflokkurin eigur ongan lut í tí óeydnispolitikki, sum førdur er síðani hendan samgonga varð skipað, og syndarligi ruðuleikin bleiv ikki skaptur við sjálvstýrisfloksins luttøku í januar 1989.

Tvørturímóti mæltu vit til heilt aðrar loysnir, sum táverandi samgongupartnarar okkara ikki tóku undir við, og tí er úrslitið sum tað er í dag!

VJ hevur í fleiri oddagreinum roynt at sannføra fólk um, at eisini sjálvstýrisflokkurin eigur lut í tí búskaparliga hurlivasa, sum hendan samgongan hevur komið føroyska samfelagnum út í.

Hann veit betur, og javnaðarflokkurin veit betur, men kortini roynir hann seg við pop-oddagreinum sínum, at fjala út yvir leiklut javnaðarflokksins, og fjala út yvir, at leiklutur teirra er leiktur við ivasomum úrslitum: í gerðum, skrift og orðum.

Men allur sannleikin er neyvan sagdur við einum pennastroki í oddagreinum í Sosialinum, so lætt sleppur vj neyvan.

Ivasami leikluturin at vaska javnaðarflokkin krita hvítan er ein ótrúlig roynd at fjala veruligar hendingar, sum eru farnar fram í føroyska samfelagnum tey seinastu mongu árini.

At skuldseta sjálvstýrisflokkin at hava lagt grundarsteinin fyri tí politiska ruðuleika, sum í dag er galdandi, er heilt burturvið, og tænir ongum øðrum endamáli, enn ein ógrundað útspilling av einum flokki, sum við ágrýtni og eldhuga hevur myndað andstøðuna, meðan javnaðarflokkurin hevur verið áskoðari og óvirkin, í so stóran mun, at sjálvt tykkara egnu eru ovfarin av leikluti tykkara á tingi.

At tað so kortini ber til at fáa politiskan ágóða av einum so óvirknum politikki, tað kunnu vit koma aftur til eina aðru ferð.

Men tað er neyðugt at føroyska samfelagið fær eina nýggja dynamiska politiska leiðslu, sum kann sameina allar partar í samfelag okkara, í eini roynd at endurreisa sorlaða búskaparliga støðið, á einum frælslyntum miðflokka støði, har ávirkanin frá høgra og vinstra verður avmarkað sum frægast.

Fyrst tá trúgvi eg, at ein glotti fer at hómast fyri framman!

Lasse Klein